Havnar leksikon:

# Meinigheitshúsið varð bygt í 1896

Meinigheitshúsið í Havn varð bygt í 1896, og hevði Heimamissiónin í Havn sítt virksemi har til 1940, tá bretska hervaldið yvirtók húsini øll krígsárini.

Eftir kríggið var húsið aftur Meinigheitshús, til flutt varð í nýggjan bygning í Húsagøtu við SMS í 1985. Eftir tað bleiv húsið á Vaglinum bygt um til býráðssal.

Myndin er tikin í 1898. Vit síggja einki annað hús oman fyri bøgarðin. Leggið til merkis hvussu lítið húsið er broytt hesi árini, fimm vindeygu og trappurnar eru í sama stað. Húsini eru ivaleyst klødd av nýggjum, men stórviðurin er tann sami.

Á myndini síggjast trý ungfólk fara spákandi niðan eftir »Kærligheds-stigen«, sum N. Finsensgøta varð rópt tá í tíðini.

Stutt eftir at hendan myndir er tikin, varð byrjað at byggja oman fyri bøgarðin, nevnast kann t.d. at nólsingurin »Skraddar Nolsøe« bygdi húsini á horninum Sverrisgøta/N. Finsensgøta í 1901, og Føroya Sparikassi varð tikin í brúk í 1905.

Nevnast kann at Heimamissiónin í Havn vóru teir fyrstu sum byrjaðu við sunnudagsskúla fyri børn í Føroyum í 1894, tvey ár áðrenn Meinigheitshúsið varð bygt. Kanska onkur av lesarum okkara veit hvar sunnudagsskúlin byrjaði.

Fyri at hava nakað at samanbera við hava vit eina nýggja mynd frá sama stað 107 ár seinni

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í samband við myndirnar, eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Birgar Johannessen á telefon: 314647 / 273168.


*Mynd: Jens Kristian Vang*


*Mynd: Føroya Fornminnisssavn*